# Skúvoy – ein søgulig náttúruperla

**Skúvoy er ein av okkara perlum. Bygdin er vøkur og oyggin, sum er væl vallað, hevur borið nógvan fugl og ber nógvan seyð. Men hetta er ikki nóg mikið til, at fólk støðast í oynni, nú krøvini til tilveruna – útbúgving og arbeiði – eru so stór**

SKÚVOY
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*


*Oljutunnur eru ein partur av bygdamyndini í Skúvoy*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað er hugnaligt og áhugavert at vitja á eini útoyggj – ikki minst, har tú ongantíð hevur verið áður. Soleiðis var tað við stórum áhuga, at eg pakkaði skjáttuna og fór til Skúvoyar seinasta leygardag, nú høvi endiliga beyðst.

Ríka fuglameingi og søguligu støðini á hesi oyggj hava altíð hugtikið, og nógvir túrar kundi verið gjørdir út hagar, áðrenn tú keddi teg har úti.

Har baldist Sigmundur Brestirson fyri 1000 árum síðan, og har verður hildið, at hann liggur grivin saman við øðrum skúvoyingum í Ólavsgarði. Var Sigmundur líka stórur í vavi, sum svørurin omaná vøllinum er, var hann avgjørt ikki nakar píningur! Steinurin við krossmerkinum, sum stendur við endan á grøvini, er ein partur av leivdunum frá fornari tíð.

Ein vitjan norður í Dal, Fagradal, har Rannvátoft og Rannvákelda eisini boða frá síni søgu, er hugtakandi, og tú kennir teg afturi í tíðini, tá ið mannavirðið var lítið millum tey ráðandi.

Sambært skaldsøguni hjá Dagmar Joensen-Næs, er Rannvá eisini grivin í Ólavsgarði, sum er fyrsti kristni kirkjugarður her á landi.

## Vøkur bygd

Skúvoy er ein av okkara perlum. Bygdin er vøkur og oyggin, sum er væl vallað, hevur borið nógvan fugl og nógvan seyð. Men hetta er ikki nóg mikið til, at fólk støðast í oynni, nú krøvini til tilveruna – útbúgving og arbeiði – eru so stór.

Skúvoyingar harmast um, at bjargafuglurin hevur verið so illa fyri og vónirnar um, at árið í ár verður betur enn tey undanfarnu, eru einki serligar, tí hildið verður ikki, at náttúruviðurskiftini eru til vildar.

Í Skúvoy hava tey bæði lomvigu, lunda og skráp, men hetta eru alt fuglar, sum liva av nebbasild. Tá ið lítil og eingin sild er við landið, spyrst lítið burtur úr fuglinum, sum noyðist til havs eftir føðini. Slík ár kemur sjáldan nógv undan, og hetta kann skapa eina ringrás sum gongur útyvir fuglastovnin.

Skúvoy ber einar 1000 áseyðir, harav einir 600-800 seyðir verða tiknir á hvørjum heysti.

Eingin kúgv, kálvur ella hestur er í oynni í løtuni.

## Framtíðin

Tað er ilt at siga, hvussu framtíðin hjá eini bygd sum Skúvoy sær út, men útlitini eru ikki góð.

Færri enn 40 fólk búgva í oynni, og skúlabørnini eru bert tvey í tali, umframt barnið, sum lærarinnan sjálv eigur.

Sum skilst, verður lærarinnan ikki verandi í oynni komandi skúlaár, og haraftrat fer tað eina av hinum báðum børnunum úr barnaskúlanum og í framhaldsdeildina. Ætlanin er tó, at hesin næmingurin gongur 8. flokk í Skúvoyar skúla.

Eingi onnur børn í skúlaaldri eru í Skúvoy.

Í bygdini er handil og har er eisini posthús. Elverk er í oynni, og ein maður tekur sær av postbátinum, tá ið hann kemur og fer.

Skúvoyingar eru sum heild vælnøgdir við ferðasambandið, sum er millum Skúvoy og Sand við Sildberanum.

Hendan dagin, vit vitjaðu Skúvoy, runaði hann eitt sindur í sjónum, og tann eina túrin sleit Sildberin ein av trossunum, meðan hann lá við bryggjuna. Tó siga skúvoyingar, at fáir dagar eru um veturin, at einki sjóvegis samband er millum Skúvoy og Sand, men eru líkindini vánalig, er neyðugt at taka hædd fyri ættini og sjóvarfallinum.

## Bátahylurin

Tað eru ikki so nógv ár, síðan skúvoyingar fingu bátahyl, men sum skilst, er hesin ikki til stóra nyttu, tí sjáldan er ráðiligt at hava bát liggjandi í hylinum.

Hóast summar er, var ikki komandi inn í hylin hjá glastrevjabáti allan leygardagin, og tá kann ikki sigast, at hylurin er nóg góður.

Men, sum skúvoyingar siga, er hann betur enn eingin hylur…

Ein stórur trupulleiki hjá skúvoyingum í dag, er oljan til húsarhaldini, sum kemur til bygdina í tunnum.

Hjá okkum, sum koma av fastlandinum, er tað óskiljandi, at hetta skal vera neyðugt í dag.

Elverkið í bygdini hevur tangar og olju, og tað tykist undarligt, at ikki ber til at samstarva um, at húsarhaldini fáa olju haðani við einum minni bili, sum kann fylla á tangarnar, sum hóast alt ikki eru so nógvir í tali. Í øðrum kommunum er ikki ókent, at oljufeløgini samstarva um goymslur, og tað átti eisini at borið til hjá elfelagnum at samstarva við skúvoyingar um olju.


*Á grøvini hjá Sigmundi Brestirsyni í Ólavsgarði í Skúvoy saman við ferðaleiðaranum, Jóhan Hentze*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*


*Fyri nøkrum árum síðan fingu skúvoyingar bátahyl, men sum skilst á skúvoyingum, er lítil dugur í honum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Fólk í Hesti fyrireika seg til stevnu

**Nú Útoyggjafelagið fer at halda sín triðja aðalfund, sum hesaferð verður í Hesti, verður eisini skipað fyri stevnu við ymiskum til undirhalds, bæði til børn og vaksin. Skipað verður fyri gongutúrum og ferð út í Koltur, og um kvøldið spælir Twilight til dans**

ÚTOYGGJASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*


*Í hesum døgum hava hestfólk nógv at takast við, nú Útoyggjafelagið heldur aðalfund, og útoyggjastevna í hesum sambandi verður í Hesti leygardagin, 19. juni*

Leygardagin, 19. juni, heldur Útoyggjafelagið sín triðja aðalfund, sum hesaferð verður hildin í Hesti.

Fyrsti aðalfundurin hjá felagnum varð hildin í Skúvoy, og í fjør varð aðalfundurin hildin í Kalsoynni.

Eins og undanfarin ár, verður aftur í ár skipað fyri stevnu í samband við útoyggjafundin. Á skránni verða nógv ymisk tiltøk, bæði fyri børn og vaksin. Eisini verður skipað fyri gongutúrum í Hesti og útferð í Koltur. Vitjað verður við minnisvarðan norðanfyri bygdina, og høvi verður eisini hjá fólki at vitja í kirkjuna í Hesti, har greitt verður frá henni.

## Seta og sangur

Sjálvur aðalfundurin hjá Útoyggjafelagnum byrjar leygardagin klokkan 13, og klokkan 15 bjóðar útoyggjaumboðið í Hesti, Sanna Silvurstein, vælkomin til stevnu og setan.

Tað verður Heðin Mortensen, býráðslimur í Tórshavnar kommunu, sum setir stevnuna. Við setanina verður eisini kórsangur við Sólarmagnskórinum og felagssangur.

Á útoyggjastevnuni í Hesti verður eisini dansur, og tað verður Twilight sum fer at spæla og undirhalda – væntandi til langt út á náttina.

## Eykatúrar

Í samband við aðalfundin og stevnuna, sigla Teistin og Norðlýsið fleiri eykatúrar millum Gomlurætt og Hest, og bussar koyra millum Farstøðina og Gomlurætt.

Fólk úr Norðoyggjum, sum ætla sær á aðalfund og stevnu, sleppa suðureftir við Brimli og norðuraftur við skipinum seinni um kvøldið.

Fyrireikararnir siga, at stevnurnar í Skúvoy og Kalsoy vórðu væl vitjaðar, og tí vóna tey, at stevnan í Hesti eisini fær stóra undirtøku.

– Vit vóna, at hetta verður ein ógloymandi dagur og eitt ógloymandi kvøld, siga tey.

# Konsert og hugnaløta í Fuglafirði

**Danski klaverprofessarin, John Damgaard, fer at spæla á nýggja flyglið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og Petur Martin Petersen fer at hugleiða um listamálaran, Jóannes Kristiansen**

TILTAK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*


*Í kvøld verður Mentanarhúsið í Fuglafirði karmur um klavertónleik á høgum støði, og høvið verður eisini at hoyra um listamálaran, Jóannes Kristiansen og síggja nøkur av hansara verkum*

Í kvøld, hóskvldið, verður konsert og hugnaløta í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Nýggja flyglið í Mentanarhúsinum sigst at vera einastandandi, og hóskvøldið sleppur tað aftur rættiliga at standa sína roynd.

Konsertfelagið hevur nevniliga boðið danska klaverprofessaranum, John Damgaard, at royna seg við teir svørtu og hvítu tangentarnar.

– John Damgaard fer á eina ferð við teimum, sum koma at lurta, inn í vakrasta tónleikin, ið skrivaður er fyri klaver. Talan er um fimm av teimum kendu Impromptus eftir eysturríkska tónaskaldið, Franz Schubert. Eisini fer hann at framføra russiskan tónleik eftir Mussorgsky, sigur Konsertfelagið.

Klaverprofessarin fer eisini at greiða eitt sindur frá um tónleikin, hann spælir.

## Víðakendur

John Damgaard er víðakendur sum klaverleikari og hevur ferðast um allan knøttin við sínum klaverkynstri. Eisini eru hansara evni sum lærari høgt í metum, og hevur hann alt upp mangar úrmælingar í starvi sínum sum professari á Kongaliga Tónlistarskúlanum í Århus.

Umframt tónleikin í Mentanarhúsinum, verður eisini eitt myndlistarligt íkast til hesa mentanarløtu. Tað verður Petur Martin Petersen, sum fer at hugleiða um listamálaran, Jóannes Kristiansen. Eisini verða málningar hjá honum at síggja í Mentanarhúsinum.

Í steðginum verður kaffi og køkur.

Tað er Konsertfelagið, sum saman við dyggum stuðlum úr Fuglafirði, skipar fyri konsertini og hugnaløtuni.

Atgongumerki fáast til keyps við dyrnar fyri konsertina.


*John Damgaard er víðakendur sum klaverleikari og hevur ferðast um allan knøttin við sínum klaverkynstri*

# Ragnar tekur yvir á Beta


*Ragnar Olsen tekur nú við sum stjóri í P/F Beta eftir Olaf Olsen, sum hevur verið stjóri í felagnum í mong ár*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

STJÓRASKIFTI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgin, fríggjadagin, verður móttøka í hølunum hjá P/F Beta í Saltangará í samband við, at Olaf Olsen, sum hevur verið stjóri í felagnum seinastu mongu árini, letur stýrisvølin til Ragnar Olsen, sum seinastu árini hevur starvast hjá reiðarínum.

Ragnar, sum er 38 ára gamalur, er sonur Olaf og Honnu Olsen á Glyvrum. Hann er giftur Siggu, sum er úr Leirvík. Tey búgva í Søldarfirði og eiga trý børn. Ragnar, sum í fleiri ár starvaðist í Føroya Banka, er býráðslimur í Runavíkar kommunu.

Móttøkan á P/F Beta verður millum 15 og 17 fríggjadagin.